ÁRSFRÁGREIÐING

SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ 2020.

Norðurlanda samstarv.

Árliga ráðstevnan, sum danska Sjúkrarøktaretiska ráðið skuldi skipa fyri, var samstundis 30 ára jubileum hjá ráðnum. Ráðstevnan varð tíverri avlýst vegna corona og verður vónandi uppafturtikin í septembur 2021. Ætlanin var at gera serliga nógv burturúr vegna teirra jubileum. Soleiðis var fyrsti dagurin settur av til fyrilestrar við sera viðkomandi fyrilestrarhaldarum og um kvøldið var skipað fyri veitslu fyri innbodnum. Næsti dagur var ætlaður til ráðstevnu fyri norðurlendsku sjúkrarøktaretisku ráðunum.

Ráðstevna og temadagar.

Ein temdagur um refleksjón, við Jacob Birkler sum fyrilestrarhaldara, var í umbúna at verða tann 10 desember á Hotel Føroyum. Tíverri varð neyðugt at avlýsa dagin vegna corona fyribyrging. Ætlanin er ístaðin at flyta temadagin til apríl/mai í 2021. Vónandi verður eisini møguleiki fyri at hava fleiri luttakarar við tá.

Temadagurin er í komin gjøgnum samstarv við allar áhugabólkarnar hjá felagnum. Sjúkrarøktaretiska ráðið innkallaði limir í áhugabólkunum til fund, til tess at byrja eitt hugarák um samstarv og hvussu vit best stuðla hvørjum øðrum í at røkka teim endamálum, vit sum ráð og nevndir eru sett at virka fyri. Burturúr hesum spratt hugskotiðið um at gera ein temadag um sjúkraøktaretiska refleksjón.

Ráðið hevur skipað fyri at umseta etiska frymilin, sum nýttur verður til refleksjón. Tá layout arbeiði er liðugt verður frymilin sendur til prentingar. Hetta er sami frymil sum hini norðurlendsku sjúkrarøktaretisku ráðini brúka til refleksjón.

Burturúr fundinum við áhugafeløgini, spratt eisini eitt uppskot um at halda eina ráðstevnu um etikk í smásamfeløgum. Í januar verður fyrsti fyrireikandi fundur ímillum áhugafeløgini og ráðið um fyriskipanina.

Ætlanin er at skipa fyri fleiri temadøgum við evnum sum eru viðkomandi fyri sjúkrarøktarfakið. Samstundis er ætlan um at taka etiskar tvístøður upp aftur til viðgerðar í ráðnum og seta hesar í Vøku ella á netið.

Facebooksíðan hevur víst seg at hava stóra undirtøku, har eisini nakrar truplar støður og tvístøður hava verið nevndar. Hesar eru sera viðkomandi at taka upp til refleksjón, men hóast áheitanir, verða ikki fleiri tvístøður sendar til ráðið. Tvístøður, sum sjúkrarøktarfrøðingar uppliva á einari deild, koma vanliga eisini fyri á øðrum deildum og kunnu, um tær verða viðgjørdar, stuðla og økja um førleikan at handfara etiskar tvístøður innan alla sjúkrarøktina. Tí hevur tað týdning at hesar tvístøður verða gjørdar sjónligar.

Búmerki.

Ráðið hevur arbeitt við at gera eitt búmerki. Nógv ymiskt hevur verið í uppskoti, men avgjørt varð at búmerki skuldi vísa, at ráðið er partur at Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Fundir hava verið við Hannis Egholm, sum hevur teknað nøkur uppskot, og vit eru nú um at koma á mál við hesum arbeiði.

Yrkisetisku leiðreglur.

Arbeitt hevur verið við at gjøgnumganga og revidera yrkisetisku leiðreglurnar. Hetta er eitt stórt arbeiði og kundi tí eisini verið skipað sum eitt samstarv millum áhugabólkarnar og Sjúkrarøktaretiska Ráðið. Eisini hevur verið frammi at fáa eitt samstarv í lag við danska Sjúkrarøktaretiska ráðið, men hetta er ikki liðugt viðgjørt enn.

Etiska ráðið.

Sjúkrarøktaretiska ráðið og Siðfrøðinevndin hjá felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar samstarva við Etiska ráðið um at taka ymiskar etiskar spurningar ella trupulleikaøkir upp. Fundir hava verið einaferð árliga og hevur fundurin í ár verið fyrst í desembur. Umrøtt var at hava okkurt felags kunnandi tiltak, kjak upplegg ella líknandi saman við etisku nevnd hjá psykologfelagnum, men enn er onki avgjørt. Vit fara at hava eina felags fund um evnið í vár.

Ráðið.

Meta av Fløtum og Beinta Kollslíð søgdu seg úr ráðnum áðrenn seinasta aðalfund. Á aðalfundinum vóru valdar, Birna Mohr Joensen, sum er fyrrverandi limur í ráðnum og valdi at stilla upp aftur, og Lillian Dam, sum er nýggjur limur, í ráðið. Vit ynskja teimum vælkomnar.

Ráðið hevur skipað seg við Janu Mortensen sum forkvinnu, Katrin Andersen sum næstforkvinnu, Birnu Mohr Joensen, Marjun Thomsen og Lillian Dam sum limir og Hildur við Høgadalsá sum tiltakslim.

Vit vilja eisini nýta høvið til at takka Metu og Beintu fyri sera gott og gevandi arbeiði og samstarv øll árini.

Fyri ráðið

Jana Mortensen, forkvinna.